## Bjørk hevði vatnílætið

Bjørk Herup Olsen hevði føroyska vatnið við, tá oyggjaleikirnir eisini vórðu settir við sonevndu vatnceremoni'ini. Vatnið er tað, sum luttakandi oyggjarnar fyrst og fremts hava í felag. Tí er tað ein fastur partur av hátíðarhaldinum, at allar lutakandi oyggjarnar hava eitt ílæt við vatni heimanífrá. Sum tekin um samleikan millum oyggjarnar, verður alt vatnið síðani blandað saman við setanina.



## Tríggir føroyingar við heiðursmerkjum

Fyriskipararnir av oyggjaleikunum á Rhodos hava heitt á almennu føroysku umboðini um at handa heiðursmerki á Oyggjaleikunum. Týskvøldið skal Jóannes Eidesgaard, løgmaður handa heiðursmerkini í 200 metra frísvimjing hjá monnum. Mikudagin fer Heðin Mortensen, ÍSF-forseti, at handa heiðursmerki í 400 metra frísvimjing hjá kvinnum. Og hósdagin skal Jógvan á Lakjundi handa heiðursmerkini í einstaklingakappingini í compound hjá kvinnum.

# sentanini





*Talan var um sera flott show, tá forngrikska søgnin varð søgd*
Mynd: Álvur Haraldsen

*Í miðjuni av Acropolis leikvøllinum var stór scena sett upp*
Mynd: Álvur Haraldsen